# Á gáttini til heimsins besta PISA skúla

**Tilmælini um fólkaskúlan eru mong og umfatandi í álitinum, sum ein arbeiðsbólkur handaði Jógvani á Lakjuni landsstýrismanni, mikudagin. Í álitinum eru uppskot um at styrkja fakliga førleikan hjá næmingum, og at menna fólkaskúlan.**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Landsstýrismaðurin í mentamálum setti tann 13. juli 2006 arbeiðsbólk, sum skal lata landsstýrismanninum tilmæli um, hvørji átøk eiga at verða framd í fólkaskúlanum beinanvegin, soleiðis at næmingarnir kunnu styrkja sínar fakligu førleikar og læra at nýta sína vitan í breiðum hópi.

### Skakandi úrslit

Arbeiðsbólkurin hevur nú handað landsstýrismanninum álitið, har sagt verður, at PISA-undankanningin vísti vánaligt fakligt avrik hjá føroyskum næmingum. Hon elvdi til kjak, sum var merkt av, at allir partar, sum varða av skúlanum, ynskja at arbeiða saman um at menna skúlan, og neyðugt er hjá øllum pørtum at taka PISA undankanningina til eftirtektar.

– Hinvegin so vísti PISA-undankanningin eisini, at næmingarnir trívast væl í skúlanum og høvdu góð viðurskifti við lærararnar. Eisini vísti kanningin, at í sambandi við KT –nýtslu, so vóru føroysku næmingarnir væl fyri, sigur arbeiðsbólkurin.

### Málrætta átøk

Arbeiðsbólkurin varð biðin um at viðgera málið við atliti at leiklutinum hjá lærarum, foreldrum, kommunum, skúlastýrum, Mentamálaráðnum og viðvíkjandi lesiætlanararbeiði, sum kann menna viðurskiftini, bæði í og kring fólkaskúlan.

Við støði í PISA-undankanningini skuldi arbeiðsbólkurin koma við uppskotum um neyðug átøk, sum skjótt kunnu setast í verk, og viðgera onnur viðkomandi viðurskifti, sum arbeiðsbólkurin metti hava týdning.

– Átøkini skulu vera málrættað, og tað skal greitt kunna vísast á, hvar og hvussu tiltøk verða sett í verk, sum kunnu betra um støðuna hjá fólkaskúlanum, var uppgávan.

### Nógv satsøki

Í niðurstøðuni frá Pisa-undankanningini stóð at lesa, at um vit lata vera við at samanbera okkum við onnur lond, men einans greina tær føroysku dáturnar, koma tó áhugaverd úrslit fram, sum kunnu leiða til skúlapolitiska umráðan.

– Í fyrstu atløgu eigur at verða umrátt, hvørt lærarafórleikin er nøktandi, og hvørt undirvísingartilfarið í øllum lærugreinum í Føroya lutfalsliga smáu skúlum er nøktandi. Eisini er nógv sum bendir á, at teir veikastu eins og teir sterkastu næmingarnir fáa ikki nøktandi og hóskandi avbjóðingar. Líkt er til, at orsøk er at hyggja nærri eftir, hvørt arbeiðsumhvørvið í skúlunum er nóg friðarligt og nóg væl skipað (reiðiligt, ruddiligt, hampiligt) – um ófriður og órógvandi atburður er í tímunum, og um, við øðrum orðum, dissiplinin ikki eigur at verða styrkt. Heimaarbeiði og annað frítíðarvirksemi, við tilknýti til fak og skúla, eru ikki eyðsýnd føroysk satsingarøki. Ungu fólkini vitja sjáldan tey almennu bókasøvnini, hóast hetta annars í øllum londum tykist at hava týdning fyri førleikan hjá teimum ungu. Gott er tað kortini, at føroysk ung brúka lutfalsliga meira tíð til at lesa dagbløð og til lesing, har KT verður nýtt sum amboð, enn t.d. donsk ung, stóð millum annað at lesa í niðurstøðunum frá Pisa-undankanningini.

# Nýggjur frískúli í Havn

**Ætlanin er at seta á stovn ein nýggjan frískúla, sum fer at lata dyrnar upp fyri teimum fyrstu næmingunum næsta skúlaár. Í fyrsta umfari verða tað tær báðar, Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard, sum undirvísa og reka skúlan.**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Foreldur at børnum, sum skulu í skúla næsta ár, kunnu velja at senda børnini í frískúlan, sum verður settur á stovn í hesum døgum.

Síðani lógin um frískúlar varð samtykt í 2002, hevur ikki verið nógv ítøkiligt at hoyra um evnið, men tað hevur mangan ljóðað, at ymiskir áhugabólkar hava arbeitt við at seta á stovn frí- og eftirskúlar. Fyri tveimum vikum síðani varð kunngjørt, at ætlanir eru um at seta á stovn eftirskúla í Hvalba, og nú eru so eisini ítøkiligar ætlanir um at seta á stovn ein frískúla í Havn.

Tað eru tvær kendar og royndar skúlakvinnur, Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard, sum hava tikið stig til at seta frískúlan á stovn, og sambært teimum, er skúlin grundaður á námsfrøðiligar áskoðanir.

Ætlanin er at byrja í august 2007 við umleið 20 næmingum í 1.-2. flokki og skúlin fer eftir ætlanini at vaksa spakuliga við einum flokki um árið, til og við 7. flokk.

– Vit hava ikki funnið hølini til skúlan enn, men vit kunnu væl húsast í einum sethúsum fyrstu árini, tí vit leggja so spakuliga fyri við einum flokki fyrsta árið. Eitt annað er, at vit mugu fyrst kanna um áhugi er fyri at tekna næmingar til frískúlan og soleiðis staðfesta, um veruligur tørvur er á einum tílíkum tilboði, sigur Eyðbjørg Dalsgaard. Og hon vísir á, at tær hava verið í sambandi við nógv fólk og myndugleikar í fyrireikingartíðars keiðinum, og øll hava verið sera positiv mótvegis hugskotinum.

– Øll hava tikið væl ímóti okkum og víst góðan vilja, líka frá kommununi, Mentamálaráðnum, feløgunum hjá lærarum og pedagogum og Læraraskúlanum, har vit samstarva um, at næmingar kunnu koma í starvsvenjing hjá okkum.

### Grundhugsjónin

Skúlin hevur longu fingið eina heimasíðu, www.friskulin.org, har greitt verður frá grundhugsjón, skúlaskipan og øðrum.

Í sambandi við grundhugsjónina verður sagt, at skúlin er eitt stað, har næmingar læra og mennast. Uppgáva skúlans er at virka fyri, at hvør einstakur næmingur lærir og mennist, og í so stóran mun, sum til ber, fær brúkt øll sín evni.

Greitt verður frá, at læring er ein aktiv tilgongd í næminginum og fyri at læra krevst tíð og tryggleiki.

– Næmingurin skal hava tíð og rúm til at uppdaga, leggja til merkis, eksperimentera, reflektera og eisini at venja og automatisera, verður sagt. Og hildið verður fram, at sosial interaktión er ein týdningarmikil partur av læring, og at næmingar læra og mennast gjøgnum upplivingar, royndir og í interaktión við ymiskt tilfar.

Og sagt verður, at øll børn mennast, hvør í sínum lag. Fyri at stimbra og stuðla hvørjum einstakum barni í menning síni á øllum økjum - kognitivum, sosialium/etiskum, kropsligum og musiskum/listarligum - er tað neyðugt at møta barninum, har tað er, fyri at tað kann mennast optimalt.

– Lærarin skapar, saman við næmingunum, eitt stimbrandi og trygt umhvørvi, ein felagsskap, har barnið gjøgnum hóskandi aktivitet fær brúkt og lært ymiskar teknikkir og strategiir. Soleiðis leggur skúlin upp fyri fjølbroytni í læruháttum og í ymiskleikanum í børnunum, vísa Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard á í grundhugsjónini fyri nýggja frískúlan.

Og tær leggja afturat, at við at geva børnunum veruliig akademisk val, gevur lærarin barninum hóskandi ávirkan á og ábyrgd av síni læring og møguleikan fyri at finna og brúka sína røddd. Í øllum hesum er lærarin medvitandi og virkin, eitt nú sum fyrimynd, vegleiðari, stuðul, mentor, samskipari og myndugleiki.

### Heildagsskúli

Viðvíkjandi skúlaskipanini verður greitt frá, at henda skúlaskipanin krevur tíð til næmingarnar. Tey skulu sjálvi ogna sær vitan: eksperimentera og uppliva "aha løturnar"; arbeiða umaftur og umaftur fyri at umbyggja teirra fatan, so hon rúmar tí nýggja; venja og brúka teirra nýggju vitan í øðrum samanhangi.

Tí er skúlin ein heildagsskúli, frá kl. 8.00 - 14.45 + møgulig frítíðaransing til kl. 17.00, við hóskandi aktiviteti og avbjóðingum frá skúlabyrjan.

### Lærugreinabýtið

Eyðbjørg og Sharon arbeiða fram ímóti, at dagurin er settur saman av tvørgreinaligum arbeiði og grundtímum. Í byrjunardeildini eru grundtímarnir føroyskt og støddfrøði. Restin er skipað undir tvørgreinaliga arbeiðinum. Ítróttur hevur sítt fasta pláss á vikuskránni.

Miðdeildin verður í høvuðsheitum skipað sum byrjunardeildin, tó verða grundtímarnir víðkaðir, nú fleiri lærugreinar skulu við, eitt nú fremmand mál og alis/evnafrøði.

– Menningarstøðið í flokkinum/stovuni er avgerandi fyri, hvussu dagurin verður uppbýttur. Dagsskráin er í stóran mun tann sama hvønn dag. Hetta gevur tryggleika og lættir um tilrættaleggingina bæði hjá lærarum og næmingum. Eisini skapar tað rúm fyri fjølbroytni og spontaniteti innan kendar og tryggar rammur. So hvørt sum næmingarnir gerast eldri, taka tey vaksandi ábyrgd av tilrættaleggingini av teirra egna skúladegi og arbeiði, siga stigtakararnir, sum ikki bert eru tær báðar, men eisini onnur fólk, sum eru knýtt at einum fyrireikingarbólki.

### Fundur um frískúlan

Vegna fyrireikingarbólkin boða tær báðar, Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard, frá, at kunnandi fundur verður fyri áhugaðum mánakvøldið, 30. oktober 2006, kl. 20 á Háskúlanum í Havn. Og har verður eisini høvi til at skriva børn inn til komandi skúlaár, 1. og 2. flokk, skúlaárið 2007-2008.